# MÚRURIN ON FIRE!



**Ófatiligt, at menninir í Páll Finni Páll ferð eftir ferð megna at fáa fjøldina at kóka - hóast vánaligar umstøður**



Barbara Holm
barbara@sosialurin.fo

Við einum braki av einari framførslu megnaðu Páll Finnur Páll at fáa troyttu og køldu áskoðararnar at gloyma alt um vánaligu umstøðurnar, ringa veðrið og longu koyrnar.

Sum heild vóru færri fólk á festivalinum leygarkvøldið, enn tað høvdu verið hinar festivaldagarnir.

Veðrið var ikki av tí besta, og við vindi og regni var tað heldur ótespiligt á festivaløkinum, og sum verða man, so var einasta tjaldið, ið seldi øl og annað, fult av fólki, og tískil var bíðitíðin alt ov long.

## Ace of Base hitaðu upp

Hóast tað tóktist leingi at bíða, frá tí teir fyrstu ferð komu á pall til sjálv konsertin byrjaði, so bleiv bíðitíðin við eitt gloymd, tá ið teir trivu í fyrsta lagið.

Finnur Jensen og Páll Oddur Rubeksen, oddamenninir í bólkinum, vóru enn einaferð fantastiskir at lurta eftir, og við teirra kendu slagarum sang tann stóra mannamúgvan við til hvørt orð í hvørjum sangi.

Við løgum sum "Eg", "Herbergið" og "Russiski vinur" var hetta ein frálíkur endi av einum heldur lítið sigandi kvøldi, og eins og Finnur Jensen tók til, so tóktist tað mest sum at Ace of Base bert vóru upphiting hjá Páll Finnur Páll, ið eftir øllum at døma vóru tann bólkur, ið flestu festivalgestirnir bíðaðu eftir.

Enn einaferð vístu Páll Finnur Páll seg sum teir tungvektararnir teir eru, og spurningurin er, um hesir føroyski tungvektararnir ikki eru ein av høvuðsorsøkunum til, at føroyingar leita sær á festival. Í øllum førum má sigast, at framførslan við Múrin ikki bert var ein sum fall inn í mongdina. Páll Finnur Páll vístu seg frá sínari bestu síðu, og allarhelst telist hendan framførslan ímillum teirra bestu nakrantíð og ímillum tær bestu við Múrin.

Vóru fleiri føroyskir tónleikarar sum hesir, so var neyvan neyðugt hjá G!, Summarfestivalinum og Múrinum at brúka alt ov nógvar pengar uppá útlendskar leivdir frá fortíðini.

**Páll Finnur Páll hava valla verið betur enn tað sama**

# se bjóðaðu í karaokeball



Ace of Base hava sæð betri dagar enn í Kirkjubø

**Ace of Base byrjaði við buldur og brak, og bjargaðu sær sjálvum við øllum hittunum. Svenski bólkurin var tó ikki eitt høvuðsnavn verdugur**



Sveinur Dam
Sveinur.dam@
gmail.com

Hví man hevur valt, at eitt avdankað svenskt 90'ara orkestur skal vera høvuðsnavn, er mær ein gáta. Eg vildi nógv heldur hoyrt eitt nú The Dreams ella kanska Týr, tá festivalurin fór at ganga móti endanum. Men rætt skal vera rætt. Tey skuffaðu ikki so nógv, kanska tí at eg ikki hevði nakrar vónir til framførsluna, sum var flott uppsett, men øgiliga kitsjut.

## Buldur og brak

Ace of Base byrjaðu við buldur og brak, tá flotta ljósshowið byrjaði, og silhuettir av dansarum dansaðu runt á pallinum. Yvirhøvur var koreografiin á pallinum góð, ljósshowið riggaði væl og sangarinnan var í toppformi. Men tað riggaði tó ikki super væl, tí tað var týðiligt, at bólkurin hevði sína stórheitstíð fyri nógvum árum síðan.

Fyri tað fyrsta, so skuldu tey altso havt eitt orkestur á pallinum, tí tað sær eitt sindur láturligt út, ikki so mikið sum at hava ein DJ, sum stýrir tónleikinum. Har var einans eitt kór og tvey keyboard á pallinum, umframt guitarin, sum høvuðsmaðurin Ulf Berggren viðhørt spældi á. Hetta gjørdi, at tað var sum at vera til eina karaoke framførslu. Hesin Ulf var eisini ómetaliga kiksaður, minti meg um ein annan Ron Jeremy, har hann stóð í frakka, langum slikkhári og stórum búki. Kiksað.

Tað størsta yvirraskilsi, var, at sangarinnan, Jenny Berggren, faktiskt sang óluksáliga væl. So væl, at eg í byrjanini helt, at tað var playback. Tað var tað tó ikki, skilti eg, sum framførslan fór fram. Hon dugdi eisini sera væl at fáa gongd í áhoyrarnar, sum vóru ógvuliga lívligir gjøgnum framførsluna.

## Hittini bjargaðu konsertini

Ace of Base hava, hóast alt, eina rúgvu av stórum hittum, sum tey allarflestu kunnu syngja við til. Hetta bjargaði framførsluni frá at vera ordiliga kiksað, tí ein kann ikki lata vera við at lata seg forføra eitt sindur, tá tú hoyrir fleiri túsund fólk syngja við. Hæddarpunktið kom tó ikki fyrr enn í eykanummarinum, tá The Sign stóð úr hátalarunum. Har vóru neyvan meira enn nøkur fá, sum kundu halda sær frá at syngja við tá.

Alt í alt ein framførsla, ið var í lagi, men als ikki ein, sum burdi verið høvuðsnavn á einum so stórt uppslignum festivali sum Við Múrin. Næstu ferð vóni eg veruliga, at teir fáa eitt ordiligt og aktuelt navn, at spæla leygarkvøld.